# Kvívíkingar hildu høvdið kalt

**8-MANNAFØR** Hóast teir hesa ferð vórðu álopnir frá fleiri síðum, so megnaðu kvívíkingar at vinna fyri fjórðu ferð á rað

Tróndur Arge



*Ljósablái Kvívíkingurin aftur fremst*

Eftir fýra kappingar er Kvívíkingur rættuliga nær. Eitt er, at Kvívíkingur hevur vunnið allar fýra róðrarnar, og eitt annað er, at hinir bátarnir hava skiftst um at vera næstfremstir.

Tí er Kvívíkingur undan trimum teimum seinastu kappróðrunum fimm stig frammanfyri Argjabátin, sum aftur er fýra stig frammanfyri Fríggjaran og fimm stig frammanfyri Árnfirðingin.

Á 1000 metra teininum var kappingin hjá Kvívíkingi størri, enn hon hevði verið tær tríggjar undanfarnu ferðirnar. Árnfirðingur, Argjabáturin og Fríggjarin royndu allir at vera fremstir. Tá ið mest um galt, tóktist Kvívíkingur hava styrkina og taktiska snildið, sum skal til fyri at vinna, men so lætt var tað kortini ikki. Knoturnar í teimum trimum kappingarneytunum vóru fleiri, enn undanfarnu kappingar kundu bent á, at tær fóru at vera, og á málinum var fjarstøðan frá Kvívíkingi og aftur til Fríggjaran á fjórða plássi bara ein stór hálv bátslongd.

Gongdin hesa ferð kundi bent á, at tað verður rættuliga spennandi næstu ferðirnar, og tað kann væl vera, at tað í onkrum av teimum trimum róðrunum, sum eru eftir, fer at eydnast at taka Kvívíking. Men tað er neyvan nakar ivi um, at Kvívíkingur á Ólavsøku fer at standa við FM heitinum – tí fyrsta síðani 2002!

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 04:33.03 |
| 2 | Argjabáturin | 04:34.08 |
| 3 | Árnfirðingur | 04:34.11 |
| 4 | Fríggjarin | 04:35.02 |
| 5 | Ørvur | 04:43.22 |
| 6 | Knørrur | 04:45.23 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Kvívíkingur | 28 |
| 2 | Argjabáturin | 23 |
| 3 | Fríggjarin | 19 |
| 4 | Árnfirðingur | 18 |
| 5 | Ørvur | 11 |
| 6 | Knørrur | 9 |

# Sølmundur settur undir trýst

**6-MANNAFØR KVINNUR** Enn eina ferð eydnaðist tað kvinnunum í Kappróðrarfelagnum NSÍ at vinna, men hesa ferð var kappingin frá Hvessingi størri, enn hon hevur verið undanfarnu ferðirnar

Tróndur Arge

Fyri fjórðu ferð av fýra møguligum vóru tað kvinnurnar umborð á Sølmundi, sum vunnu kappróðurin millum 6-mannaførini við kvinnum. Tí er Sølmundur stórfavorittur at vinna FM heitið, sum hesin báturin ongantíð áður hevur ognað sær.

Men hesa ferð var sigurin ikki so sannførandi, sum hann hevur verið hinar tríggjar ferðirnar. Hvessingur úr Hvalvík-Streymnesi, sum hevur verið næstfremstur allar ferðirnar í ár, var fremstur nógv tann størsta partin av teininum, og tað var ikki fyrrenn í endaspurtinum at guli báturin var tann drúgvasti og vann.

Munurin aftur til Hvessing var bara sjálvur stavnurin, og tað kundi bent á, at tað er lagt upp til sera spennandi kapping, tá ið hesir bátarnir hittast aftur. Tað verður á Fjarðastevnu, sum verður í Vestmanna nú leygardagin.

Hesa ferð var Riddarin úr Miðvági frammanfyri Gongurólv, og nú liggja hesir báðir bátarnir stavn um stavn í kappingini um bronsukrónurnar.

*trondur@sosialurin.fo*

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sølmundur | 05:04.11 |
| 2 | Hvessingur | 05:04.14 |
| 3 | Riddarin | 05:10.21 |
| 4 | Gongurólvur | 05:14.09 |
| 5 | Jarnbardur | 05:28.05 |
| 6 | Kollfirðingur | 05:34.18 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sølmundur | 28 |
| 2 | Hvessingur | 24 |
| 3 | Gongurólvur | 18 |
| 4 | Riddarin | 18 |
| 5 | Lómur | 9 |
| 6 | Jarnbardur | 9 |
| 7 | Kollfirðingur | 2 |

# Páll Fangi er størsti FM favoritturin



**6-MANNAFØR MENN** Fleiri lógu framvið, og Tvørabáturin gav klaksvíkingum ein skarpan gang, men hann megnaði kortini ikki at taka Páll Fanga

Tróndur Arge

Hesin róðurin var ein av teimum, sum teir sunnanfjørðs kanska høvdu vónað skuldi taka seg soleiðis upp, at annar av teirra bátum fór at vinna. Bæði vágbingar umborð á Smyrli og tvøramenn umborð á Tvørabátinum hava jú fyrr í ár víst, at tað er møguleiki fyri sigri til bátarnar í Suðuroy.

Men enn eina ferð vóru suðuroyingarnir og allir hinir, sum taka lut í hesi kappingini, ið er tann størsta av øllum, at staðfesta, at Páll Fangi úr Klaksvík er í einum flokki fyri seg sjálvan.

Í startinum vóru Tvørabáturin, Smyril, Riddarin, Skúgvur og Strálan allir væl við. So líka sum setti Páll Fangi seg á róðurin, og eina løtu var fjarstøðan frá tí fremsta og aftur til teir næstu tað mesta av einari bátslongd.

Sum bátarnir nærkaðust málinum var eingin ivi um, at tað var Tvørabáturin, sum var stinnastur av teimum, sum vóru aftanfyri tann fremsta, og í endaspurtinum gekk Tvørabáturin ógvuliga væl. So væl at tað leyp lítið av hjá Páll Fanga, sum kortini enn eina ferð var fyrstur á mál.

At tað hevur verið so tøtt kapping millum teir næstu ber við sær, at Páll Fangi er fleiri stig frammanfyri næsta kappingarneytan, enn nakar annar er tað. Tí er Páll Fangi størsti FM favoritturin. Men gongdin í Vági boðaði frá, at Páll Fangi framvegis skal spenna seg rættuliga út, um hann skal vinna allar róðrarnar.

**ÚRSLIT**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 04:44.18 |
| 2 | Tvørabáturin | 04:45.09 |
| 3 | Riddarin | 04:48.13 |
| 4 | Strálan | 04:50.04 |
| 5 | Smyril | 04:50.16 |
| 6 | Skúgvur | 04:53.17 |
| 7 | Hósvíkingur | 04:54.24 |
| 8 | Jarnbardur | 05:01.00 |
| 9 | Kollfirðingur | 05:06.13 |
| 10 | Sølmundur | 05:07.18 |

**STØÐAN**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Páll Fangi | 28 |
| 2 | Tvørabáturin | 22 |
| 3 | Riddarin | 20 |
| 4 | Smyril | 17 |
| 5 | Strálan | 12 |
| 6 | Skúgvur | 9 |
| 7 | Hósvíkingur | 3 |
| 8 | Lómur | 1 |